Fleiri rásir - einki roks



*Enn einaferð roynir Superman (Christopher Reeve) at bjarga Jørðini*

**Á Kanal 5 sunnukvøldið kl. 19.00**

# Superman aftur á ævintýrferð

Yvirgangsmenn hava hertikið Eiffiltornið. Teir ætla at spreingja eina kjarnorkubumbu, og blaðkvinnan Lois Lane skrivar um spentu støðuna. Men hon kemur ov tætt at yvirgangsmonnunum, og so má hennara starvsfelagi og beundrari, Clark Kent, enn einaferð lata seg í Superman-klæðini og bjarga henni úr vandanum. Í síðstu løtu eydnast tað Superman at beina fyri kjarnorkubumbuni við at kasta bumbuna langt út í rúmdina, áðrenn hon spreingist. Á Jørðini er lagið gott, nú alt endaði so væl, men eingin veit av, at kjarnorkuspreingingin úti í rúmdini hevur ført við sær ein nógv størri vandi. Orsakað av spreingingini verða teir tríggir óndu Krypton-svíkjararnir - við tí samvitskuleysa Zod Generali á odda - latnir leysir. Zod Generalur og hansara fylgisveinar hava sameint seg við tí ræðuliga Lex Luther - og aftur hava teir óndu lagt eina ónda, geniala ætlan, ið snýr seg um at fáa alt vald á jørð. Lois Lane hevur uppdagað, at Clark er Superman, og fyri at kunna gifta seg við Lois, so fer Clark til sítt goymistað á Suðurpólinum fyri at sleppa av við sínar superkreftir og gerast til ein heilt vanligan mann. Men, nú tann ræðuliga ætlanin hjá teimum óndu kemur fram, má Clark gera alt tað hann kann fyri at fáa sínar superkreftir aftur.

**Amerikanskur ævintýrfilmur frá 1980**
**Upprunaheitið:** Supermann II
**Við:** Superman/Clark Kent: Christopher Reeve. Lex Luthor: Gene Hackman. Lois Lane: Margot Kidder. Otis: Ned Beatty. Perry White: Jackie Cooper. Non: Jack O'Halloran. Ursa: Sarah Douglas. Eve Teschmacher: Valerie Perrine. General Zod: Terence Stamp.
**Leikstjórn:** Richard Lester.



*Krypton-svíkjararnir: Zod Generalur, Ursa og Non*

**Á Dr1 mikukvøldið kl. 19.00**

# Summardokumentar - Flóttabørn og ættarfalsan

"Eg slapp ikki at siga, at tey ikki vóru míni røttu foreldur", soleiðis fortelur ein 8 ára gamal svarthærdur drongur við stórum brúnum eygum. DR fylgir við einum 8 ára gomlum flóttabarni, sum er rýmt heimanífrá. Sendingin avdúkar, at fleiri flóttabørn eru familjusamanførd við foreldrum í Danmark, ið ikki eru teirra. Fylgt verður við tí 8 ára gamla dreinginum á eini sera spennandi ferð aftur til tey røttu foreldrini í Irak, sum sendu teirra son avstað til Danmarkar. Yousef er úr Irak og sambært samleikaskjølunum varð hann familjusamanførdur við foreldrum sínum í 2001. Men árið eftir rýmir Yousef heimanífrá. Løgreglan finnur hann á høvuðsjarnbreytarstøðini í Keypmannahavn. Einsamallur hevur hann tikið tokið úr Juelsminde, har hann hevur búð. Løgreglan setir seg í samband við sosialu myndugleikarnar í Juelsminde. Hann sigur frá, at hann er blivin sligin, at



hann hevur verið innilæstur á rúmið sínum og onkutíð hevur hann ikki fingið mat. Um hann sigur nøkrum frá, at hann ikki er sonur til tey bæði, ið hann býr saman við, so verður hann sendur til Týskland. Sendingin hyggur nærri eftir orsøkunum til, hví tílík børn koma til Danmark. Í sendingini síggja vit eisini eina lítla kommunu stríðast við eitt sera torført mál, har kommunalu myndugleikarnir skulu fylgja flóttabarninum aftur til tey røttu foreldrini í Irak.

*DR fylgir einum 8 ára gomlum flóttarbarni, sum rýmir heimanífrá. Yousef avdúkar, at foreldrini í Danmark als ikki eru hansara veruligu foreldur.*